## Kvinnur betri prestar

Í áravís hava danir keglast um, hvørt kvinnur eiga at vera prestar ella ikki, men nú sker bispurin í Århus, Kjeld Holm, ígjøgnum. Sum prestar eru kvinnurnar betri egnaðar enn menn, sigur hann við Ritzau. Bispur vísir á, at kvinnur hava tað øðrvísi við umsorgan og áliti enn menn. Tey seinastu árini er talið á kvinnuligum prestum vaksið nógv í Danmark, og á teimum lærdu háskúlunum eru tað fleiri kvinnur enn menn, sum lesa guðfrøði.



*Kvinnuligu prestarnir eru teir bestu*
*Mynd: DR*

## DFDS í tungari aldu

Fyrsti ársfjórðingurin í ár royndist illa hjá danska reiðaríinum DFDS. Roknskapurin vísir, at hesar mánaðirnar var vinningurin góðar 60 milliónir krónur minni enn somu mánaðir í 2007 ella 58 milliónir krónur fyri skatt. Orsøkin er minkandi umsetningur og størri útreiðslur til viðíkahald av skipum felagsins. Kortini væntar Niels Smedegaard, forstjóri, at árið í ár fer at geva eina hálva milliard krónur í avlopið sum upprunaliga mett.

# Sandoyingar mannsterkir til Havnar at krevja tunnil

**Í morgin fara sandoyingar í kravgongu til Havnar við undirskriftum úr allari oynni við kravi um at fáa undirsjóvartunnil beinanvegin**

SANDOYARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í morgin verður innrás av sandoyingum í Havnini.

Tá fara sandoyingar at savna so nógv fólk, sum tilber í eini kravgongu til Havnar fyri at fáa undirsjóvartunnilin beinanvegin.

Í gjárkvøldið varð kallað saman til borgarafund í Skopun, at viðgera málið um undirsjóvartunnilin.

Og hóast kallað varð til fundar við stuttum skotbrái, møttu eini 150-200 fólk úr allari oynni á fundi.

Á fundinum var full semja um at stríðast til tað síðsta fyri at fáa samgonguna at halda løgtingssamtyktina sum sigur, at farast skal undir undirsjóvartunnilin næsta heyst.

Tí ganga tey í dag hús úr húsi í Sandoy og savna inn undirskriftir við kravi um at fáa tunnilin og í morgin er ætlanin at fara mannsterk til Havnar at handa landsstýrinum undirskriftirnar.

### Mannsterk til Havnar

- Vit eru samd um at stríðast til tað seinasta fyri at fáa undirsjóvartunnilin, sigur Fríðhild Winther í Skopun, sum var ein av fyrireikarunum, saman við Elisabeth Leo og Arndis Nicolajsen.

Umframt tey bæði, vórðu Eyðun Viderø og Mads Andrias Hansen, vanliga nevndur Basa, eisini valdir í ein bólk at samskipa tiltakið.

Fríðhild Winther sigur, at í dag ganga tey hús úr húsi at savna inn undirskriftir og í morgin er ætlanin at savna so nógv fólk, sum tilber fyri at fara í kravgongu til Havnar at handa landsstýrinum undirskriftirnar.

Men hon ger samstundis greitt, at ætlanin er ikki at leggja oynna lamna í morgin og sostatt er ikki ætlanin at leggja arbeiðið niður á fiskavirkjum, skúlum, dagstovnum, eldrabýlum, ella aðrastaðni fyri at fara til Havnar.

- Vit fara so nógv til Havnar, sum tilber, uttan at leggja arbeiðsplássini lamin, sigur hon.



### Ómetaliga vónbrotin

Annars fortelja fundarfólk fyri Sosialinum, at borgarafundurin í Skopun í gjárkvøldið, var lívligur, men sakligur.

Og tað er eisini týðiligt, at sandoyingar eru ómetaliga vónbrotnir av tí, sum nú er komið fram um, at tunnilin skal útsetast til í 2012 ella 2013

- So er bara at vóna, at samgongan tekur løgtingslógina í álvara, sum sigur, at undirsjóvartunnilin skal byrja næsta ár, sigur Fríðhild Winther.

Men hon ásannar, at mótstøðan er hørð og serliga harmar tað hana, at tað, eftir hennara tykki, hevur eydnast at venda meginpartin av Føroya fólki ímóti sandoyingum í hesum máli.

- Vit verða ikki bara forfylgd av samgonguni, tí vit eru eisini forfylgd av einum stórum parti av vanliga føroyinginum og allastaðni, sandoyingar koma, verður tað briksla okkum, at vit skulu hava tunnil. Tí verður tað tungt hjá okkum, sigur Fríðhild Winter.

## Vemmilig samansvørjing ímóti sandoyingum

**Gerhard Lognberg sigur, at tað undir ongum umstøðum verður góðtikið, at Sandoyartunnilin verður útsettur**



*Gerhard Lognberg er framvegis ikki til at vika í málinum um undirsjóvartunnil*

SANDOYARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað, sum nú fer fram í samgonguni, er ein vemmilig samansvørjing ímóti sandoyingum.

Hetta er støðan, sum Gerhard Lognberg, løgtingsmaður úr Sandoy hevur, nú samgongan skal viðgera málið um, hvussu útbyggingar skulu raðfestast tey næstu árini.

Í hesum sambandi er tað ein stórur spurningur, hvussu verður við teimum báðum undirsjóvartunlunum, sum eru á tapetinum, Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin.

Borgarafundur var í Skopun í gjárkvøldið og har var Gerhard Lognberg eisini til staðar.

Og eftir fundin sigur hann, at ætlanin í hjá politikarum í samgonguni um at útseta Sandoyartunnilin í fýra ella fimm ár, er einki minni enn ein tað er ein vemmilig samansvørjing ímóti sandoyingum.

Hann vísir á, at Løgtingið hevur samtykt, at arbeiðið upp á undirsjóvartunnilin skal byrja um eitt ár og hann krevur, at hendan samtyktin verður hildin.

- Tað verður undir ongum umstøðum góðtikið, at vikið verður frá hesi samtyktini hjá Løgtinginum, sigur hann.

Tí stendur hann fast við tað, hann alla tíðina hevurført fram um, at skal hann framvegis vera partur í samgonguni, skal tunnilin gerast nú.

# Páll er styrktur í trúnni

**- Vit vita púra greitt, hvat sandoyingar vilja og sum tingmaður úr Sandoy er tað ikki annað enn natúrligt hjá mær at vera ein partur av fólkinum, sigur Páll á Reynatúgvu**

SANDOYARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sandoyingar hava ongantíð áður staðið so væl saman um nakað mál, sum um Sandoyartunnilin. Og sum tingmaður úr Sandoy er tað ikki annað enn natúrligt hjá mær at vera ein partur av fólkinum.

Tað sigur Páll á Reynatúgvu, tingmaður úr Sandoynni, eftir borgarafundin í gjárkvøldið um undirsjóvartunnilin.

Páll á Reynatúgvu var eisini staddur á fundi og hann sigur, at niðurstøðan kann ikki vera onnur enn tann, at tað er púra greitt, hvat fólkið í Sandoynni vil.



*Sandoyingar eru púra samdir og tað er ikki annað enn natúrligt hjá mær at vera samdur við fólkinum, sigur Páll á Reynatúgvu*

- Og hjá mær, sum tingmanni úr Sandoy, er tað púra natúrligt at verða ein partur av fólkinum har, leggur hann afturat.

Hevur hann tú verið sannførdur um sína støðu í málinum um undirsjóvartunnilin, er hann enn sterkari í trúnni nú.

- Sameiningin á fundinum var so sterk, at eg kann ikki uppfata tað øðrvísi enn at tað eisini var ein bindandi fundur fyri meg, sum tingmann, tí tá ið fólkið er so samt, er tórført hjá mær at taka eina aðra støðu.

### Meiningsleyst

Páll á Reynatúgvu staðfestir annars, at hendan samgongan kann bara gera avtalur og raðfestir so leingi, sum hetta valskeiðið varar.

- Vit hava bara ábyrgdina so leingi, sum vit sita og tí er tað meiningsleyst at útseta tunnilin til í 2012- ella 2013.

- Vit kunnu ikki gera bindandi avtalur um tað, sum ein framtíðar samgonga skal seta í verk.

Páll á Reynatúgvu vil annars ikki gera fleiri viðmerkingar, fyrrenn úrslitið av samgongufundinum er greitt.

- Men hann heldur, at tá ið tað kemur til tær stóru útbyggingarnar, hevur samgongan lyndi til at stinga høvdið í sandin, tí avgerðin verður avgjørt ikki lættari av at útseta hann.

Hann sigur, at hetta er eisini ein spurningur um rættartrygd, tí løgtingið hevur samtykt Sandoyartunnilin og tí er tað at máa støðið undan rættarkensluni at avtaka løgtingssamtyktina uttan víðar, sigur Páll á Reynatúgvu.